GJALDSTOVAN

# ÚTBJÓÐINGARSKRIV

## Farmaflutningur

## Innihald


1.0 Útboð av flutningi .......... 3

1.1 Yvirskipað .......... 3

2.0 Treytir til flutning .......... 3

2.1 Yvirskipað .......... 3

2.2 Longd av sáttmálaskeiði .......... 3

2.3 Sáttmálatreytir .......... 3

3.0 Krøv .......... 4

3.1 Mongd .......... 4

3.2 Treytir og krøv .......... 5

4.0 Umsiting .......... 6

4.0 Rokningar og upplýsingar .......... 6

5.0 Tilgongdin at finna ein veitara .......... 6

5.0 Samráðingar og sáttmáli .......... 6

5.1 Fyrivarni og minstakrøv .......... 6

5.2 Viðgerð av innkomnum tilboðum .......... 7

5.3 Meting .......... 7

5.4 Uppgerð av prís .......... 7

5.5 Tillutan av sáttmála og endi á útboð .......... 8

# 1.0 Útboð av flutningi

## 1.1 Yvirskipað

Gjaldstovan vil við hesari áheitan geva tykkum møguleikan at bjóða uppá at fáa rammusáttmála at flyting av vøru til Føroya – vegna allar landsins stovnar.

Útboðið verður framt sum eitt alment útboð sambært rundskrivi nr. 9000 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum. Tær formligu reglurnar í hesum útboði viðvíkjandi innlating av tilboði, samskifti í millum útbjóðara og tilboðsgevara og aðrar upplýsingar eru at finna í hesum útbjóðingarskrivi.

Kjarnuuppgávan er at verða tænastu veitari hjá landsins stovnum, tá hesir hava tørv á at flyta vøru til Føroya.

# 2.0 Treytir til flutning

## 2.1 Yvirskipað

Veitarin skal átaka sær “transport” uppgávuna og ikki bara verða “formidlari” av farminum.

Arbeitt verður eftir:

- Incoterms 2020
- Hauge-Visby rules
- Lokalari lóggávu
- NSAB 2015

Veitarin skal geva stovnum ein fastan kundaráðgeva, sum skal vera tøkur til spurningar ella um avbjóðingar koma fyri. Er viðkomandi ikki til staðar, so skal veitarin altíð hava avloysara tøkan.

## 2.2 Longd av sáttmálaskeiði

Keyp Landsins ynskir at gera ein trý ára sáttmála við flutningsveitara um veiting av flutningstænastum.

Veitarin og Gjaldstovan eru heimilað at siga hendan sáttmála upp við skrivligari fráboðan við eini freist á tríggjar mánaðir til sáttmálaenda seinast í einum mánað. Er talan um týðandi mishald, kann sáttmálin sigast upp við skjótari freist, í stendur mát við mishald.

## 2.3 Sáttmálatreytir

Við sáttmálanum bindur Keyp Landsins landsins stovnar, sum eru knýttir at rammusáttmálanum, at fylgja ásetingum í rammusáttmálanum. Tað kunnu verða stovnar, sum longu hava bundið seg til annan veitara, og hesir koma við í avtaluna so skjótt teirra avtala gongur út.

Meginreglur og undantøk
Meginreglan er at allir stovnar landsins eru umfataðir av útboðnum. Meginreglan er eisini, at hetta útboð umfatar standard vøruflutning, sum ikki hevur serlig krøv. Tað kunnu vera støður, har tað ikki er møguligt hjá einum stovni at verða partur av hesum rammusáttmála. Serliga tá talan er um serflutning, so sum serliga virðismikil vøra, vøra sum skal flytast undir serligum treytum ella skundflutningur (express). Flutningur, sum hevur serlig dokumenatónskrøv, kann eisini verða undantikin. Flutningur við serligum temperaturi, kann verða undantikin. Til dømis hevur Apoteksverkið stórar mongdir av serflutningi av heilivági, sum hevur serlig góðskukrøv – hesin flutningur er ikki við, men vanligur farmur hjá Apoteksverkið er við. Fyri farm, sum ikki er umfataður av hesum rammusáttmála, stendur tað stovninum frítt at nýta annan veitara.

Flutningur uttanfyri Danmark
Hesin sáttmáli er serliga ætlaður til vøru úr Danmark. Tá stovnar skulu hava vøru frá øðrum londum, so kann hesin sáttmálin brúkast til at fáa vøruna frá Danmark og heim. Stovnar kunnu biðja um prís frá øðrum veitara enn tann, sum vinnur rammusáttmálan, fyri at samanbera prísin við tann í rammusáttmálanum. Bíligari kostnaðurin verður valdur.

Stovnar kunnu gera egnar rammusáttmálar
Stovnar kunnu søkja um at sleppa undan at vera partur í hesum rammusáttmála. Meginreglan er tá, at stovnurin skipar sítt egna útboð. Í slíkum førum er tað krav, at stovnurin hevur verði í samskifti við vinnandi veitaran av rammusáttmálanum, fyri at vissa sær, at tað ikki er gjørligt at gerast partur av rammusáttmálanum.

Krøv til veiting
Sjóvegis farmur til Føroya skal verða í beinleiðis rutu, so tað tekur stytstu tíð. Veitarin skal verða royndur á økinum og hava eitt uppbygt netverk í Føroyum og Danmark.

Annað
Veitarin kann ikki áleggja nýggj ómaksgjøld, rykkjaragjøld ella onnur gjøld, sum ikki eru við í tilboðnum frá veitaranum. Allir prísir skulu verða uttan MVG.

Fyrivarni verður tikið fyri villum í útboðnum og neyðugum broytingum, og tí tilskilar Keyp landsins sær rættin at senda út møguligt rættingarskriv. Somuleiðis tilskila vit okkum rætt til at strika hetta útboð, og bjóða út av nýggjum – um orsøkir tala fyri tí.

Meginreglan er at prísvøkstur verður góðtikin í sáttmálatíðarskeiðinum, um hon kann stendur mát við vanliga samfelagsprísvøksturin. Í samband við force major líkandi støður, kann hægri prísvøkstur góðtakast. Í samband við príshækking kann Gjaldstovan velja at fara í nýtt útboð, heldur enn at góðtaka prísvøksturin.

# 3.0 Krøv

## 3.1 Mongd

Tað er ikki gjørligt at uppgera neyvt hvussu nógvan vøruflutning landsins stovnar fara at hava í komandi tíðum. Vit kunnu tó upplýsa, at samlaða upphæddin í 2024 í krónum var 8.3 milliónir. Av hesum var

- 7.4 milliónir krónur í sjófarmi

- 0.4 milliónir krónur í flogfarmi
- 0.3 milliónir krónur í tollavgreiðslugjøldum
- 0.2 milliónir krónur fyri vøruhotel

Eitt sindur av óvissu er millum býti av sjófarmi og flogfarmi, tí tað ikki altíð framgongur á faktura hvat slag av farmi talan er um. Eitt sindur av útflutningi er sannlíkt í tølinum, so innflutningurin er sannlíkt lægri enn upplýst.

Vit síggja, at stovnarnir høvdu góðar 800 tollavgreiðslur. Vit vænta, at samlaða tali av sendingum er hægri enn talið av tollavgreiðslum.

Teir størstu stovnarnir, sum eru fevndir av rammusáttmálanum eru: Rúsdrekkasøla landsins, Almannaverkið, Landssjúkrahúsið, Landsverk, Kringvarp Føroya, Suðuroyar sjúkrahús, Heilsufrøðisliga Starvstovan, Umhvøvisstovan, Fróskaparsetur Føroya og Tjóðsavnið.

## 3.2 Treytir og krøv

Sjófarmur
Vit síggja fyri okkum, at veitarin hevur eitt uppsamlingstað í Danmark – so sum FAS Aarhus. Vit síggja fyri okkum, at levering er til bústaðin hjá stovninum. Veitarin skal upplýsa treytir og prísir í einum príslista.

Flogfarmur
Vit síggja fyri okkum, at vit hava tvey sløg av flogfrakt. Eina er EXW, har veitarin heintar vøruna á einum bústað í Danmark, og koyrir vøruna til bústaðin hjá stovninum í Føroyum. Hin loysnin er FCA, har veitarin fær vøruna til sítt uppsamlingarstað í Danmark, heintar vøruna, og koyrir hana til bústaðin hjá stovninum. Veitarin skal upplýsa treytir og prísir í einum príslista.

Tollavgreiðsla
Vit síggja fyri okkum. at veitarin bjóðar tænastuna at tollavgreiða til teir stovnar, sum ynskja tað – mótvegis gjaldi. Avgerðandi er, at veitarin upplýsir treytir og prísir í einum príslista.

Útkoyring í Føroyum
Veitarin skal koyra vøruna til stovnin, og seta hana inn um, har tað er turt, og har tað ber til at rulla vøruna inn við pumpuvogni. Veitarin skal upplýsa treytir og prís fyri at koyra kring landið.

Vit síggja fyri okkum, at okkara vøra verður koyrd út so skjótt, sum hon er komin til landi. Tað merkir, at matur og líknandi vøra við styttri haldføri, kemur fyrsta arbeiðsdag og onnur vøra í seinasta lagið annan arbeiðsdag.

Trygging
Sjálvsábyrgd við trygging er 1 milliónir krónur sambært rundskriv um tryggingar hjá landinum. Hetta merkir, at trygging verður einans teknað tá ein sending hevur virði hægri enn 1 millión krónur, og við einari sjálvsábyrgd á 1 millión krónur. Veitarin skal upplýsa treytir og prísir í einum príslista.

Vøruhotel
Summir stovnar nýta hesa tænastu. Hetta er ikki ein avgerðandi tænasta fyri samlaðu veitinga, tí hava vit ikki stór krøv. Avgerðandi er, at veitarin upplýsir treytir og prísir í einum príslista.

Veitarar kunnu bjóða aðrar tænastur. Hesar skulu verða lýstar í einum príslista við treytum. Meginreglan er, at tær ikki telja við í samlaðu metingina.

# 4.0 Umsiting

## 4.0 Rokningar og upplýsingar

Stovnarnir og veitarin samskifta beinleiðis. Stovnar rinda sjálvir fyri síni keyp. Keyp landsins á Gjaldstovuni hjálpir fegin, um ivamál eru.

Upplýsingar um rammusáttmálan við prís og treytum verður lagdir út á keypsportal.fo – har bert stovnar landsins hava atgongd.

Rokningin skal verða talgild, í vanligum oio-sml format. Veitarin, sum vinnur útboðið, bindur seg til at lata Keyp landsins upplýsingar um sølu hjá stovnum landsins, tá Keyp Landsins umbiður hesar.

Gjaldstovan hevur tørv á at fáa upplýst hvussu stór árlig sparing er í mun til vanligan listaprís. Hendan upplýsing er ikki neyðug í sjálvum tilboðnum, men kann koma aftaná.

# 5.0 Tilgongdin at finna ein veitara

## 5.0 Samráðingar og sáttmáli

Útbjóðarin hevur heitt á teir stovnar sum hava nógvan flutning, um at luttaka í einari dómsnevnd. Í dómsnevndini sita Landssjúkrahúsið, Almannaverkið, Rúsdrekkasølu Landsins, Tjaldurs Apotek – umframt Keyp landsins.

Vit ætla ikki, at tað skal verða nakað samráðingarumfar. Útbjóðari kann tó venda sær til tilboðsgevarar við tí endamáli at neyvlýsa innihaldið í tilboðnum, og tá ið hetta ikki elvir til mismun í millum tilboðsgevarar.

Tað vera sostatt ongar sáttmála- ella príssamráðingar í samband við hetta útboðið, og tískil verður heitt á tilboðsgevara um at fyrireika tilboðið soleiðis, at sáttmálin kann undirskrivast á tilboðsskjalinum, har allar treytir í útbjóðingartilfarinum eru við.

Øll krøv í útboðstilfarinum eru minstukrøv. Eitt minstakrav verður skilt sum eitt krav, ið treytaleyst skal lúkast.

a. Fyrivarni og minstukrøv

## 5.1 Fyrivarni og minstakrøv

Tilboð, ið ikki lúka øll minstukrøv verða burturvíst, men tað verður tó sipað til, at útbjóðari kann venda sær til

tilboðsgevarar við tí endamáli at neyvlýsa innihaldið í tilboðnum, og tá ið hetta ikki elvir til mismun í millum tilboðsgevarar.

Tilboðsgevari verður eggjaður til at seta skrivligar spurningar, um ivamál eru í samband við útfylling av fylgiskjølunum.

Tilboðsgevarar kunnu ikki hava skuld til tað almenna, vísandi til galdandi reglur.

Tilboð skal standa við 60 arbeiðsdagar roknað frá ásettu tilboðsfreist.

## 5.2 Viðgerð av innkomnum tilboðum

Útbjóðari letur upp innkomin tilboð aftaná ásettu tilboðsfreist. Útbjóðari kannar eftir, um innkomnu tilboðini lúka form- og minstukrøv. Útbjóðari kann, aftaná tilboðsfreistina, venda sær til tilboðsgevarar fyri at neyvlýsa innihaldið í tilboðunum. At enda verða innkomin tilboð mett í tráð við ásettu tillutanartreyt.

Tá ið útbjóðari hevur tikið avgerð um tillutan av sáttmálanum, verða allir tilboðsgevarar kunnaðir samstundis. Kunningin inniheldur eina frágreiðing av avgerðini, harundir fyrimunir og vansar við vinnandi tilboðnum.

## 5.3 Meting

Sáttmálin verður tillutaður í tráð við ásettu tillutanartreyt. Metingin av innkomnu tilboðum tekur støði í fylgjandi undir tillutanartreytum:

1. Prísur 100 %

Tann sum er bíligast, og sum fær rammusáttmálan, er tann sum bjóðar eina vøru, sum livir upp til okkara minstukrøv, og sum hevur bíligasta samlaðan prís uppgjørdan einari mánaðarligari nýtslu.

Meginreglan er, at vit leggja okkum eftir at velja tann veitara, sum hevur besta prís. Hinvegin, um tað vísir seg, at tað er lítil prís munur (t.e. 2%), og tað verður mett at verða fyrimunur at ikki velja tað bíligasta tilboð, so kann dómsnevndin taka avgerð um velja annað tilboð enn tað bíligasta.

## 5.4 Uppgerð av prís

Veitarin skal upplýsa sín príslista.

Fyri at gera uppgerðina einfalda hava vit valt at uppgerða prísin, svarandi til eina ávísa nøgd av sendingum, vísandi til excel ark "Upplýsing um prís á flutning samanlagt".

Veitarin skal við støði í sínum príslista, upplýsa kostnaðin fyri hvørja sending. Hesir verða samanlagdir, og tann veitari, sum hevur lægsta samanlagda prís – er tann bíligasti veitarin.

## 5.5 Tillutan av sáttmála og endi á útboð

Sáttmálin verður tillutaður, tá ið útbjóðari hevur valt tilboðið.

Útbjóðari er ikki bundin til at taka av tilboðnum, sum hevur besta prís, og treytar sær rættin til at strika útboðið.

Útreiðslur, sum tilboðsgevarar hava í samband við hetta útboð, eru óviðkomandi fyri útbjóðara. Hetta er eisini galdandi, um útbjóðari verður noyddur at strika útboðið.

| Virksemi | Dato, klokkutíð |
|---|---|
| Freist at senda inn spurningar, sbrt. pkt. 4.1. | mánadagin 11. mai 12.00 |
| Tilboðsfreist, sbrt. pkt. 5.1. | fríggjadagin 15. mai kl 12.00 |
| Væntandi tillutan av sáttmála | 5. juni |

Vit gleða okkum at fáa tykkara tilboð.

Vinaliga

Hallur av Rana

Fulltrúi